**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 23. mai 2006, kl. $19^{00}$.**
**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Jón Mikkelsen, Jákup Oluf Hansen, Pauli Trond Petersen, Øssur Christiansen, Jóhan Simonsen og Marjun S. Olsen.
**Skrivari**: Jákup Durhuus.

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð:**

**Mál 62.**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd til umsókn frá **Janus og Manuelu Jensen** um byggiloyvi til sethús á matr. nr. $310^{u}$.
J. nr. 2005-308
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti við teirri viðmerking, at sethúsini verða staðsett sambært heildarætlan.

**Viðv. 62.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 63.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Duritu Tørslev Pedersen** um byggiloyvi til sethús á matr. nr. $108^{i}$.
J. nr. 2005-305
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 63.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 64.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Hans og Jonnu Poulsen** um byggiloyvi til sethús á matr. nr. $310^{v}$.
J. nr. 2005-304
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti við teirri viðmerking, at sethúsini verða staðsett sambært heildarætlan.

**Viðv. 64.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 65.**
Tilmæli frá somu til umsókn frá **Sólrun Dánjalsdóttir** um byggiloyvi til sethús á matr. nr. $310^{f}$.
J. nr. 2005-294
Nevndin mælir til at ganga umsóknini á møti við teirri viðmerking, at sethúsini verða staðsett sambært heildarætlan.

**Viðv. 65.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 66.**
Tilmæli frá Mentunarnevndini til ætlanin hjá **Føroya Skúlabókagrunni** um ein føroyskan undirvísingarmiðlaportal.
J. nr. 2005-309
Nevndin mælir til at svara aftur, at Vestmanna Kommuna er áhuga at luttaka, um so er at ein meiriluti av kommununum og Mentamálaráðið taka lut.

**Viðv. 66.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 67.**
Tilmæli frá somu um møugliga játtan til **teldukeyp** til skúlan.
J. nr. 2005-310

Nevndin mælir til at veita eykajáttan uppá upp til 150.000 kr til at keypa 12 farteldur og telduvogn til skúlan/skúlabókasavnið.
Nevndarformaðurin skal tó saman við leiðslu skúlans og kt-vørðinum í skúlanum kanna eftir, um tað er ein fíggjarligur fyrimunur at skifta støðuføstu teldurnar út í sama viðfangi.

**Viðv. 67.**
Samtykt við 4 atkvøðum fyri og einari ímóti at taka av tilboði frá Farodane uppá 209.900 kr uttan mvg fyri 12 farteldur á vogni og 13 støðufastar teldur, og at uphæddin verður játtað av íløgukontuni.
Pauli T. Petersen og Jákup Oluf Hansen atkvøddu blankt ímeðan Marjun S. Olsen atkvøddi ímóti við teirri viðmerking, at tað er eitt "forsømilsi" av skúlanum, at teldurnar ikki eru útskiftar.

**Mál 68.**
Tilmælir frá Havnarnevndini og Fíggjarnevndini um skipan av **økinum Inni á Fjørð**, har ætlanin hevur verið at gera m.a. kampingpláss.
J. nr. 2005-258
Havnarnevndin mælir til at heita á Bygdarráðið um at hækka játtanina til uttanhýsis tekniska ráðgeving við 20.000 kr, og at henda upphædd verður brúkt til at rinda ráðgeva fyri at gera eitt yvirlit yvir skipan av økinum.
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Havnarnevndini.

**Viðv. 68.**
Tilmælini einmælt samtykt.

**Mál 69.**
Tilmælir frá somu til tilboð uppá **liðugtgerð og uppseting av portrum** í grótbrotinum uttanfyri Grønanes.
J. nr. 2005-282
Tilboð eru innkomin frá P/F Vestmanna Skipasmiðju uppá 100.000 kr fyri 7 portur og frá Sp/f RN Maskinverkstaði uppá 45.000 kr fyri 5 portur.
Havnarnevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Sp/f RN Maskinverkstaði uppá 45.000 kr, dagf. 17. apríl 2006.
Málið annars beint í Fíggjarnevndina at játta og ávísa tilboðsupphæddina + 25.000 kr fyri tað eina portrið, sum Skipasmiðjan longu hevur gjørt.
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Havnarnevndini, og at upphæddin verður játtað av íløgukontuni.

**Viðv. 69.**
Tilmælini einmælt samtykt.

**Mál 70.**
Tilmælir frá somu um **bingjupláss** á kaiøkinum til móttøku av burturkasti frá skipum.
J. nr. 2005-312
Havnarnevndin mælir til at játta 185.000 kr til at gera bingjupláss á Heyganesi til móttøku av burturkasti frá skipum.
Málið annars beint í Fíggjarnevndina at játta og ávísa upphæddina.
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum frá Havnarnevndini, og at upphæddin verður játtað av íløgukontuni.

**Viðv. 70.**
Tilmælini einmælt samtykt.

**Mál 71.**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um **ársroknskapin** fyri Vestmanna Kommunu fyri 2005.
J. nr. 2005-279
Nevndin mælir til at góðkenna roknskapin.

**Viðv. 71.**
Roknskapurin einmælt samtyktur og undirskrivaður.

**Mál 72.**
Tilmæli frá somu um møguligt keyp av matr. nr. 231g frá **Regin Nielsen**.
J. nr. 2005-084
Nevndin mælir til at bjóða Regin Nielsen 49,- kr fyri fermeturin, tvs. 39.396,- kr, + 45.000 kr sum endurgjald fyri lendið, sum er partur av almennum vegur.

**Viðv. 72.**
Tilmælið einmælt samtykt við ískoyti um, at upphæddin í fyrstu syftu verður goldin av íløgukontuni.

**Mál 73.**
Tilmæli frá somu um útgrevstur av **fornleivdunum** Úti á Toft.
J. nr. 2005-019
Nevndin mælir til at játta 400.000 kr av íløgukontuni til útgrevstur av fornleivdunum.

**Viðv. 73.**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 74.**
Fíggjarætlan fyri Vestmanna Bókasavn fyri 2007.
J. nr. 2005-283

**Viðv. 74.**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Bókasavn fyri 2007 einmælt samtykt.

**Mál 75.**
Val av einum limi í nevndina fyri **Vestmanna Bygdarsavn**.

**Viðv. 75.**
Einmælt samtykt at velja Jákup Oluf Hansen sum nevndarlim í Vestmanna Bygdarsavn.

**Mál 76.**
Umskipan av nevndini fyri **næmingaheim**.

**Viðv. 76.**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri og ongari ímóti at velja Jóhan Simonsen í nevndina.
Jóhan Simonsen atkvøddi blankt.

Bókin lisin

Fundur lokin kl. 21$^{30}$.

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Karl A. Olsen | Jón Mikkelsen | Jákup Oluf Hansen |
| Pauli T. Petersen | Øssur Christiansen | Jóhan Simonsen |
| Marjun S. Olsen | | |